# E - og tónleikurin



**Gunnar Nolsøe, útvarpsvertur**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Ja, mamma mín spælir urgu og harmoniku og hevur eisini roynt seg við ukulele, hevur sungið í kóri og verið organistur í Klaksvíkar Kirkju, eins og eitt nú abbi mín eisini spældi urgu og harmoniku, meðan mammubeiggi mín spælir harmoniku.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Nei.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Kanska viðhvørt, men oftast havi eg útvarpið frá.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Nei, men kundi gott hugsa mær at duga at spælt upp á klaver og annars eisini saxofon.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Alt er kanska í so nógv sagt, men eitt lív uttan tónleik - tómt og ræðuligt. Tónleikur er rúsevni uttan timburmenn og er hóskandi til so at siga øll lívsins viðurskifti. Ella sum Gustav Winckler, heldur naivt, men ikki minni rætt, tók til í 1973: »Lidt go' musik gør alle mennesker glade, når jeg er træt, så spiller jeg en plade...«

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– Tað er rættuliga langt síðani, eg taldi, men einar 6.000-7.000.

*Hvat er tín yndisfløga?*
– Sera, sera torført at siga, tí tær eru nógvar, og harumframt veldst um tíð, stað, hvussu lagið er, umframt eina rúgvu av øðrum faktorum, men yvirhøvur útgávurnar hjá Abba, Bee Gees, Creedence Clearwater Revivel, Eagles, Lise Ekdahl, Enya, Frændum, Hanusi G. Johansen, Jean Michel Jarre, Jóannesi Jakobsen, Kára P., Eivør Pálsdóttir, Sade, Shakatak, Ingun Simonsen, Veðraplátan við Straight Ahead, Mit eget land við Anniku Hoydal, Allar ættir við Holger Laumann & Plúmm, tey seinru árini við Leonard Cohen, Quincy Jones framleidda Donna Summer útgávan við somu Donnu, A New World Record, Out Of The Blue og Discovery við ELO, Von og Lífið er ljúft við Bubbi Morthens, Fires at Midnight við Blackmore's Night, As times goes by - The American Songbook Volume II við Rod Stewart, har hann eitt nú syngur duett saman við Lise Ekdahl, og Swing við Robbie Williams. Og so má eg nevna spælimansútgávuna við Benny Andersson Orkester.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Fløguna við hasum yvirsukraða ljósareyða fløtasanginum »Queen of my hearts« við bólkinum Westlife.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– Tað er kanska í so arrogant at seta orð á, onkur annar kann dáma sangin, so eg lati vera.

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Veit ikki, um eg eigi nakra pínliga plátu, men sum DJ hevur tú verið noyddur at keypt nakað av tónleiki, tú annars ikki hevði keypt, og har eru tvær teirra Whatever you want við Status Quo og I wanna rock við Twisted Sisters.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– »Lyckliga gatan« við Anna-Lena Löfgren, »Long as I can see the light« við Creedence Clearwater Revivel, »Nattog« við Anne Linnet ella »Abounded love« við The Everly Brothers og so kanska »Nummar« við Terja Rasmussen.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Veldst um kvøld ella "typu" av kvøldi, hvørji fólkini eru o.s.fr., men yvirhøvur vil eg siga jazzkendir tónar við klaveri, saxofon og kanska einum góðum chroonara afturat. Annars eisini fólksligir og spælimanstónleikur, og lættur poppur í breiðastu merking...

Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?
– 52 sunnumorgnar eru um árið, so yndistónleikurin sunnumorgnar er skiftandi, men lættur poppur, jazztónleikur ella eitthvørt, ið ber á fólksliga bógvin. Annars má eg viðganga, at útvarpið sum oftast er frá.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Sum so er ongin tónleikur, ið beinleiðis fær meg í ringt lag, men onkissigandi og primitivir hardrockur, innantómur dansbandtónleikur, umframt úttambað rap, hvørs einasta endamál er at skora kassan, telist millum luttakararnar á mínum ikki-hitlista. Men treyðugt so, eisini har finnast undantøk...

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– »Lay all your love on me« og »The day before you came« við Abba, »Born to be alive« við Patrick Hernandez, fyrsta 12" versiónin av Stars on 45 við Starsound, og »Freight train« við Nancy Whiskey & The Chas McDave Skiffle Group (?) umframt karaokesangirnir omanfyri.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– Veit ikki rættuliga, men Yellow submarine, Obladi oblada og Hey Jude hjá The Beatles munnu teljast teirra millum.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– Tá Olof Palme fór til gravar, var tónleikurin jazzur, men leita vit í reyðu sálmabókina og leita fram nr. 522, finna vit ein av mínum yndissálmum: »Og Jesus, ger meg til eitt lítið ljós.«

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Á Tórshavnar Jazz, Fólka & Bluesfestivali fyri góðum tíggju árum síðani, luttók brasilianski harmonikusnidlingurin Sivuca við orkestri, og haldi eg hetta vera bestu konsertina, eg havi verið til.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– Her eru eisini fleiri, fyri ikki at siga nógvir um boði, eitt nú Barry Gibb úr Bee Gees og Jeff Lynne úr ELO, men skal EIN veljast burtur úr, má tað vera manningin í svenska superbólkinum Abba - og skal so aftur EIN veljast - nú gerst tað torført - hmm, so skal tað vera Benny Andersson ella Bjørn Ulvæus.

whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

## TELDUBRÆVIÐ

Frá: Árni Gregersen, Bornholm, arni@gregersen.mail.dk
Til: post@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Føroyar, tónleikur og útheimurin

Tá ið eg byrjaði at arbeiða sum journalistur, var tað rár hending, at Føroyar vóru nevndar í útlendskum fjølmiðlum.

Tað hendi, tá ið onkur ólukka var, ella tá ið okkurt politiskt ella kongaligt var á vási millum Føroyar og Danmark. Sjálvandi hendi tað eisini, at donsk vikubløð søgdu søguna um einstakar føroyingar.

Umframt donsku fjølmiðlarnir vóru tað helst bert teir íslendsku, sum yvirhøvur nevndu líttla oyggjaflokkin.

Tónleikin vendi eg aftur til.

Nú er vent í holuni. Í Danmark er stórt sæð ikki dagur, har Føroyar ikki verða nevndar í onkrum sambandi. Heitu viðurskiftini í ríkinum gjøgnum níti-árini hava gjørt, at danir generelt vita meira um Føroyar, men at eisini tíðindini úr Føroyum hava størri áhuga her á landi.

Á Bornholm er eisini ein gjøgnumgangandi áhugi fyri Føroyum, og tað er ikki sjáldan, at víst verður til føroysku ríkisrættarligu støðuna, tá ið tosað verður politikk her.

Bornholmararnir hava stóra virðing fyri, hvussu føroyingar hava megnað at innrætta føroyska samfelagið. Áræði verður mangan nevnt, og sett upp ímóti neira tungu skipanini her á Bornholm.

Bornholm er ein sonevnd regiónskommuna í løtuni. Tað vil siga, at øll oyggin er ein kommuna. Fyrisitingarliga loysir kommunan eisini tær uppgávur, sum amt annars hava í Danmark: tað vil fyrst og fremst siga sjúkrahús og miðnámsskúlar.

Tann sonevnda strukturkommisiónin kom í gjár við einum tilmæli um, hvussu kommunala Danmarkar-kortið skal síggja út í framtíðini. Tilmælini eru, at kommunurnar verða lagdar saman, amtini tikin burtur, og í staðin fyri tey verða gjørdar fýra til átta regiónir, sum skulu loysa tær milumkommunalu uppgávurnar.

Spennandi verður at síggja, hvussu politikararnir fara at fylgja tilmælunum, men tað liggur klárt at vit her á Bornholm eru eitt sindur framman fyri menningina á hesum øki.

Politiski dysturin á Bornholm fer at ganga út uppá at varðveita Bornholm sum ein sjálvstøðuga región ˆ ella í øðrum lagi at ávirka, hvørjum vit skulu vera saman við í framtíðini.

Aftur til umrøðuna av Føroyum. Á oynni her eru mong vinarbond til Føroyar og tað hendir meira enn so at kanningarbólkar av Bornholm vitja í Føroyum, og at føroyingar vitja her. Seinast eg veit um var í heyst, tá ið sosiala nevnd løgtingins vitjaði á Bornholm.

Og so til tónleikin. Umrøðan av Føroyum í útlendskum fjølmiðlum er eisini nógv vaksin av tónleikinum seinnu árini. Undan aldarskiftinum var tað fyrst og fremst fótbólturin, sum setti Føroyar á landkorti. Í løtuni er tað tónleikurin.

Teitur Lassen verður mangan nevndur. Vit hava sæð hann á MTV og her í Danmark hoyrist hann ofta í danska útvarpinum.

Eivør hevur tikiið Ísland við stormi, og í hinum norðurlondum eru tey nú eisini farin at leggja til merkis, at her er ein óvanlig rødd. Guðrun vann sangkasppingina í Danmarks Radio og hálvi føroyingurin Gunnar gjørdu tað sama.

Og nú er aftur ein á veg. Petsi Tvørfoss skal luttaka í allarstørstu donsku sangkappingini, Meldodi Grand Prix.

Jú alt gevur umrøðu og alt er við til at gera Føroyar kendar. Sjálvt um val stendur fyri durðum, og hart leikar á, so eiga føroyingar framvegis at vita at gleðast um, at vit nú eru meira enn ein gloymdur oyggjaflokkur.

Gott nýggjár.



VALGREINAR

# Hin ósjónligi Tjóðveldisflokkurin

**Heðin Mortensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*



Í eini roynd at eggja sínum fólki til at arbeiða fyri flokkin, sleingir Høgni Hoydal um seg við tí, ið minnir ikki sørt um mistonkiliggerð av øðrum flokkum, tá hann setir spurnartekin við, hvaðani teir fáa pening til valstríðið.

Vit, sum ferð eftir ferð hava hoyrt formann Tjóðveldisfloksins tosa um runublaking, eru farin at troyttast.

Sjálvrættvísið lýsir av honum, tá hann við miklum álvarsemi og hátíðardámi roynir at læra politikarar - úr øðrum flokkum, sjálvandi - hvat politiskt reinføri er fyri nakað, og hvussu tú eigur at uppføra teg.

"Vit mugu endurskapa álitið aftur á politisku skipanina" er ein av afturvendandi setningunum, tá hann sum ein annar sálarhirði roynir at prædika ta uppaling og siðiligheit, hann eftir øllum at døma krevur frá øllum uttan sær sjálvum og sínum egnu.

Eitt av valfeløgum tjóðveldismanna hevur skotið pappageykin og fingið sær heimasíðu við donskum navni. Tað er nú ikki tað einasta áhugaverda við hesi heimasíðu, tí hon hevur eina tænastu, ið gongur út um tað vanliga.

Millum annað kann á hesi síðu lesast eitt bræv, Høgni Hoydal fer at senda limunum í Tjóðveldisflokkinum ein av komandi døgunum. Og tað er vorðið sum brævaskifti, víðopið á internetinum!

**Almenn runublaking**

Áhugavert, má sigast, nú vit svart upp á hvítt síggja Høgna Hoydal í leikluti, ið mest minnir um smádrongin, ið fyllir sær lógvarnar av runu, áðrenn hann ger seg kláran at tveita hana í allar ættir.

Var tað ikki, tí hetta jú er púrasta óhugsandi, hevði eg næstan illtonkt hann fyri at leggja aðrar flokkar undir at fáa til vega pening á ivasaman hátt, soleiðis sum hann málber seg í tí eina brotinum:

*"Sum tit hava lagt til merkis, hevur Tjóðveldisflokkurin higartil í valstríðnum ikki verið so sjónligur í almennu miðlunum, sum aðrir flokkar. Og tað verður ikki øðrvísi. Orsøkin til tess einføld: Vit hava ikki ráð til at reka eitt dýrt valstríð. Aðrir flokkar brúka millum tvær og tríggjar ferðir so nógvar pengar sum vit, og teir lýsa í hvørjum blað. Hvaðani teir fáa peningin veit eg ikki - men vit hava so ikki ráð til slíkt."*

Var tað ikki, tí Høgni Hoydal jú er so fittur og skikkiligur, hevði ein næstan trúð, at hetta var at illtonkja hinar flokkarnar á politiska vígvøllinum fyri at fáa sær pengar til vega á slíkan hátt, at tað næstan er ódámligt.

Nei, Høgni Hoydal, tú manst vita líka so væl sum øll onnur, hvaðani politiskir flokkar fáa sín pening. Tað er væl úr sama staði, sum Tjóðveldisflokkurin fær sín?

At tómligt er á kistubotninum, kann hinvegin neyvan vera annað enn eitt týðiligt og greitt tekin um, at tá flokkurin ikki klárar at stýra sínum egna fíggjarrensli, so vildi tað verið ábyrgdarleyst av landsins veljarum at latið sjálvan landskassan og enntá landsins leiðslu upp í hendurnar á Tjóðveldisflokkinum eina ferð aftrat!

So hyggjuráðini munnu vera, at veljararnir gera, sum ein klókur maður eina ferð segði: "Lær ikki av tí sum eg sigi, men av tí sum eg geri!"

# Felags foreldrarættur, javnstøða og ráðgeving

**Katrin Dahl Jakobsen**
*løgtingskvinna og valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Galdandi lóg í Føroyum um foreldramyndugleika og samveru er avoldað og kann snøgt sagt ikki brúkast. Foreldur, og serliga børnini, eru rætt og slætt slept uppá fjall, tá tey koma í ta støðu, at hjúnaskilnaður er einasta loysn. Eingin ráðgeving og eingin møguleiki fyri at taka málið uppaftur. Hjá okkum ber heldur ikki til at hava felags foreldramyndugleika og loyvt er eisini at nýta harðskap móti egnum børnum. Hetta er beinleiðis í andsøgn við ST - sáttmálan frá 89 um rættindi hjá børnum, og sum løgtingið hevur samtykt. Sáttmálin áleggur luttakaralondunum at taka neyðug stig til tess at verja børnini. Javnaðarflokkurin tók málið upp í febr. 2003, men tíverri komu vit ikki ígjøgnum við tí. Felags foreldrarættur verður aðrastaðni tengdur at javnstøðu, og hugsast kann, at tá foreldrini hava eitt positivt útgangsstøði, ein møguleika fyri bæði, so eru betri líkindi fyri, at børnini koma ikki í klemmu. Í áravís hava vit stríðst fyri javnstøðu, men gloyma, at hon eigur at virka báðar vegir. Børnini eru púrasta verjuleys. Tað má vera okkara skylda at syrgja fyri, at teirra rættindi altíð standa fermst, og at foreldrarættindi, ella vit kundu heldur kalla tað foreldraskyldan, verður lagað eftir tí.

Nógv liggur á láni, nú samgongan stakk í sekkin. Hetta er bara eitt av teimum. Eitt mál, sum hevur ligið í dvala, sum einki skuldi gerast við, tí hetta skuldi yvirtakast!!! Helst høvdu dagføringar verið gjørdar, um samgongan ikki hevði havt lagt lok á tað við sínum yvirtøkulyftum.

# Vit tryggja økismenningina!

**Rani Nolsøe**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Norðoyggjum*



Tjóðveldisflokkurin fer í komandi setu at tryggja, at stóra menningin í okkara samfelag síðani 1998 eisini skal gerast ein rimmar økismenning kring landið.

Fyrsta týðandi stigið er at styrkja kommunurnar í útjaðaranum.

Í dag liggja fleiri uppgávur hjá miðfyrisitingini, sum nátúrliga hoyra heima í kommununum. Her er talan um fleiri viðurskiftini hjá okkara borgarum, men fyrst og fremst umsorganin fyri teimum eldru og fólkaskúlarnir.

Barnaansingin er besta dømi um, hvussu nógv betur kommunurnar eru førar fyri at umsita slík viðurskifti hjá sínum egnu borgarum. Eftir bert 3-4 árum er tørvurin so at siga nøktaður.

Men í dag hava vit ov smáar og tískil ov veikar kommunur, og so leingi tað stendur við, fáa vit einki gjørt við, at miðfyrisitingin er so óhóskandi miðsavnað og sterk.

Tí vil Tjóðveldisflokkurin, at kommunur við fyrimuni finna saman í samstarv, so vit longu í komandi setu gera tað møguligt at leggja størri uppgávur frá landinum út í kommunurnar. Tí er tað umráðandi, at kommunurnar skjótast fyrireika seg at taka í móti, við at ganga saman í samstarv ella velja samanlegging.

Men fyrst vilja vit tryggja, at hendan útlegging fer fram á ein hátt, sum tænir kommununum best. Tí vil Tjóðveldisflokkurin garantera, at tað verða kommunurnar, sum fáa tann veruliga partin av skattinum í sín kassa, sum hesi øki kosta í dag.

Hetta fer komandi árini at verða berandi mátturin undir teirri veruligu økismenning, sum vit ynskja í øllum landinum. Tað vil skapa áhugaverd arbeiðspláss uttanfyri miðstaðarøkið og hartil fleiri vinnumøguleikar og størri trivna.

Tað vil eisini loysa úr lagdi eina røð av nýggjum møguleikum fyri veruligari økismenning.

Tjóðveldisflokkurin setti økismenningina á skránna fyri seks árum síðani. Gev okkum tín stuðul at fremja eina menning av okkara samfelagi í eini betur javnvág millum miðstaðarøki og útjaðaran enn í dag.

Veljið framtíðina - veljið Tjóðveldisflokkin

# Nú skal tað verða

**Tummas Frank Joensen**
*Skúvoy, valevni Javnaðarfloksins í Sandoyar valdømi*

Latið okkum nú velja Javnaðarflokkin, sum vil taka sær av trupuleikunum hjá útoyggjafólki

Skúvoyingar gleddust um at fáa eina havn. Hetta settu vit okkara størsta álit á, og hevði hetta broytt alt hjá okkum sum búleikast har.

Men ikki gekst sum ætlað. Havnarprosjektið miseydnaðist. Havnin nær um óbrúkilig. Hetta hjartamálið hjá okkum Skúvoyingum má verða nakað, sum tann politiski myndugleikin má gera nakað við. Her er nokk bara eitt at gerða og tað er, at landið letur eina játtan, soleiðist at okkara havnarviðurskifti koma í rættlag.

Nú ið aldukanningar verða gjørdar er møguleiki at fáa eina samferðsluhavn.



Og hvat er meiri normalt enn tað, at strandfaraskipið kann koma inn í havnina og ikki sum nú, at skipið liggur við kajuna og koyrur aftur og fram. Tað kann verða ringt hjá fólki at koma umborð og í land.

Øll vit, sum búgva á okkara vøkru oyggj, vita hvussu er við sjúkraflutninginum. Tað er ikki sørt vandamikið at fáa eina børu umborð á Sildberan. Her má nakað henda skjótt. Eitt nýtt og vælhóskandi skip má koma, sum siglur væl skjótari og kann taka allan vanligan farm, sum fólkið nýtur. Eisini má hettar skip taka fleira ferðafólk.

Framhaldandi skal játtast peningur til bakkaverju, so at hettar kann gerast liðugt. Vinnan í Sandoynni má fáa somu karmar til flutning av vøru sum meginøki. Skúlamøguleikar skulu betrast saman við eini ítróttarhøll í oynni.

Hetta gerst við meira samarbeiði, og at landsmyndugleikarnir hjálptu til á hesum øki.

Forkanning skulu setast í verk av tunli til Dals og má hon setast í verk skjótast møguligt.

Sandoyingar, Skúvoyingar og Dímuningar. Farið á val 20. januar og setið ein sterkan Javnaðarflokk á ting.